SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

## Avloysari fyri skrivstovufólk søkist

Eitt áhugavert starv fyri skrivstovufólk í barðsilsfarloyvi er leyst at søkja á Dómaraskrivstovuni skjótast gjørligt . Starvið er 35 tímar um vikuna.

**Høvuðsuppgávur**

- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**

- Skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanar - og lønartreytir**
Setanar – og lønartreytir eru sambært felagssáttmála millum statansattes kartel og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Áka Andreasen, skrivstovuleiðara á 311003.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu sendast til:

**Dómaraskrivstovan**
Postrúm 28
FO – 110 Tórshavn

Ella sum teldupostur til post@sorinskrivarin.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagið **mánadagin 7.apríl kl.12.00**

## Stuðulsfólk Endurlýsing

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja **15.apríl 2008** ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági, Sosialu deild, NSR tænastuna ì Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 20 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin verður eftir avtalu við Frítíðarskúlan.

Lønin verður sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag .

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi **31. mars 2008. kl 15.00.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

TVØROYRAR KOMMUNA

## Námsfrøðingur til dagrøktina undir Tvøroyrar Kommunu

**Søkt verður eftir:**
- Námsfrøðingi til dagrøktina undir Tvøroyrar Kommunu, at byrja pr. 01 Maj 2008, ella eftir nærri avtalu. Starvið er sett til 25 t / v. Tað krevst, at tú hevur egnan bil. Fyrimunur er, at tú hevur royndir í líknandi arbeiði sum námsfrøðingur.

**Arbeiðsøkið er:**
- Sumba, Tvøroyri, Hvalba. Tað eru 117 børn í skipanini og eru tað í dag 29 dagrøktarar í starvi.

**Vit ynskja, at tú er:**
- Kreativ/ur og ígongdsetandi. Hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og øllum teirra. At tú hevur góð samstarvsevni og eisini kanst arbeiða sjálvstøðugt. Hevur hug til at skapa ein fjøllbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.

At seta tín egna dám á dagrøktina og eisini at veita pedagogiskan stuðul til tínar starvsfelagar og dagrøktina sum heild. At veita brúkaranum eina góða og trygga tænastu.

**Kommunan bjóða tær:**
- Eitt áhugavert starv millum góðar og hjálpsamar starvsfelagar. Eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika og har tú kemur at hava ávirkan á dagligdagin.

Tú vilt fáa hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni. Eisini er møguleiki fyri ymiskum skeiðum o.l. innan fyri fakið.

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum yrkisfelagið - Føroya Pedagogfelag og K.A.F.

Skrivlig umsókn við møguligum avritið av prógvi og viðmælum, verður at senda til niðanfyrinevndu adressu í seinasta lagi 07.04.2008 kl. 12.00

Meira fæst at vita um omanfyrinevnda starv, við at venda sær til Súsannu Poulsen, dagrøktarleiðara, á telefon nr.: 211339.

**Tvøroyrar Kommuna**
Tvørávegur 37
FO – 800 Tvøroyri
Att: Súsanna Poulsen, dagrøktarleiðari.



**Lastbilur til sølu** um hóskandi boð fæst

Hevur retardara sentralsmyrjing
Lastar 18.350 kg
Koyrt 662.000 km
Dekk 65%

**Ring á tlf. 741048**

**Reyði Krossur Føroya**

Aðalfundurin hjá Reyði Krossur Føroya verður **sunnudagin 30. mars 2008 kl. 15:00** í húsið felagsins.

Framsýning av bundnum pløggum til børn framleitt av Putlarabólkinum

Eftir aðalfundin fortelur Hans Holm um Romano fólkið *(Sigøjnarar)*

Nýggir limir kunnu gjalda limagjaldið á konto i banka. kr. 150,- húski og kr. 400,- fyri feløg/stovnar

## BÁTAMOTORUR TIL SØLU

Volvo Penta - kad 300 - 285 HK
*v/ vinkulgear - turbinu*

Hevur gingið 375 tímar - 21/2 til 3 ára gamal

**Vinarliga ring á tlf. 229654**